# Grønlandstíðindi

Kári við Stein

## Framvegis nógvar rækjur

**Vit hava fingið fyrstu grønlandstíðindini frá Kára við Stein. Hann hevur sum vanligt fingurin á pulsinum og greiðir frá dag fyri dag**

**29. desember**
Í dag er lot av norði og kalt, sum eg veit ikki hvat. Polar Amaroq er komin inn eftir pakningi. Teir skulla landa í Manitsoq í morgin. Qaqqatsiaq er farin út aftur úr Nuuk nýggjan túr, og Polar Natoralik er inni í Nuuk og landar eisini í dag. Tað er Polar Natarnaq eisini. Teir høvdu um 150 tons av sekkjarækjum.

**30. desember**
Ocean Tiger kom í morgun inn at landa. Har er alt við at vera fult hjá teinum. Teir loystu í kvøld og skullu inn



aftur 5. januar. Polar Amaroq, sum fór til Manitsoq at landa, mátti til Nuuk við 100 tonsum eftir í lastini, tí teir góvust bara at landa skipið.

**31. desember**
Akamalik hevur gjørt eitt rimmar ár. Teir hava fiskað fyri 150 mill. Fyri tað skulu teir hava eitt stórt tillukku frá mær, ófører. Steffen C. kom inn í morgun at millumlanda. Teir hava ligið fullastaðir í eitt gott samdøgur. Meiningin var, at teir skuldu inn til Aasiat at millumlanda. Men har var so mikið av ísi, at tað var ikki hugsingur um at koma inn hagar. Teir skuldu annars inn at landa 5. januar í Manitsoq. Teir liggja nátt yvir her. Polar Amaroq kom á fiskifeltið aftur í dag. Tað var so lýtt í dag, at vit manglaðu bara at fáa regn. Lómur fór nýggjan túr seinnapartin. Sum eg skilti so ætlaðu teir norður til Haruoynna at royna. Har eru tó ongar harur sum skilst. Ísviðurskiftini vóru ikki av teimun bestu, tá ið teir fóru.



**1. januar 2009**
Steffan C loysti aftur fyrrapartin og Akamalik kom til Nuuk seinnapartin.

**2. januar**
Í dag er stilli og -2-3 stig. Markus er komin inn higar at landa. Teir eru so at siga fullir, men teir ætla at fáa gott og væl 500 tons upp. Teir skulla ikki sigla fyrrenn í morgin. Tað eru komnir montørar úr Íslandi at umvæla teirra turbo. Lítla flogfarið, sum teir komu við, bíðar eftir montørunum, til teir eru lidnir.

**3. januar**
Natarnaq kom inn at landa í morgun. Teir máttu fyrst flyta Markus, sum ikki kundi starta maskinuni, tí turboin var tikin sundur. Men tað var í eini handavending, at skiparin Dávur Mohr kláradi hetta. Natarnaq hevur knapt 400 tons inni henda túrin.
Markus loysti um kl 18 í kvøld nýggjan túr. Frætt er frá Polar Natarnaq. Teir hava roynt í tvey døgn uppi í Godhavnsrennuni. Teir hava um 60 tons inni. Frætt er í dag, at Lómur hevur fulla last og vera teir inni í Illulisat í morgin einaferð. Har mugu teir so bíða til mánadagin 6. januar, táið virkið opnar aftur.

**4. januar**
– 5-7 stig stilli. Natarnaq loysti nýggjan túr í morgun kl 0600







AVGREIÐSLUTÍÐIR

**Mánadag til hósdag:**
Telefon: 09.00 - 16.00
Avgreiðsla: 10.00 - 15.00

**Fríggjadag:**
Telefon: 09.00 - 13.30
Avgreiðsla: 10.00 - 13.00

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14 • FO-100 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo